# Samkomublaðið fyri juli/aug

# 2015



KELDAN

Okkara visión er, at Keldan skal vera ein andaligur miðdepil fyri allar Føroyar







www.keldan.fo

Samkomuleiðarapar: Pauli & Jastrid Høj. Tlf. 232511 & 232510

# Orðið



## *Vakið og biðið!*

*Pauli Høj*

Tað er ikki fyrr enn vit vakna um morgunin, at vit finna útav, hvussu leingi vit hava sovið. Hetta kunnu vit eisini føra inn á okkara andaliga lív, tí viðhvørt eru vit sovnað andaliga. Vit eru blivin líkasæl, sjálvupptikin ella bara andaliga deyð. Tá vit so av einari ella aðrari orsøk vakna, kunnu vit blíva kløkk av, at vit hava sovið so leingi.

Ídag er umráðandi, at vit, sum kalla okkum Guds fólk, vakna og praktisera hetta orð um at vakja og biðja. Bøn er eitt sera stórt evni, og tað eru nógvar síður av bøn, sum úttrykkjast ymiskt. Eitt er okkara persónliga samfelag við Harran, eitt annað er at koma saman til bøn. Alt hetta er týðandi fyri okkara persónliga kristna lív og hevur ávirkan á okkara land og fólk.

1. Tim. 2,8:" - Eg vil tá, at menninir allastaðni skulu biðja so, at teir lyfta upp heilagar hendur, uttan vreiði og trætu,…."

2. Mós. 17,11:" So leingi sum nú Móses helt hondini upp, stóð Ísraelsmonnum til vinning; men táið hann læt hondina søkka, stóð Amalekitum til vinning."

Bøn kann verða úttrykt á ymiskan hátt. Vit síggja eisini, tá Paulus og Silas vóru settir í fongsul, at teir sungu Gudi lovsang og bóðu. Teir fingu bønarsvarið skjótt og blivu leysir, bæði teir og hinir fangarnir (Ápstl. 16:25-26).

Aðrar tíðir síggja vit, at vit skulu vera úthaldin í bønini, tí tað er ein andaligur bardagi (Ef. 6,12).

Eg ynski at uppmuntra teg at vera við til at biðja fyri okkra landi og fólki og teirri støðu, sum vit standa fyri framman. Tínar og mínar bønir hava ávirkan og eru við til at mynda, hvussu okkara land formar seg.

Tað er ongantíð ov seint at byrja at biðja. Tað, sum er umráðandi, er, at vit vakna og eru við í bønini. Frá fyrsta sekundi tú byrjar at søkja Harran í bøn, ja, so hoyrir Hann tínar og mínar bønir. (Hebr 11,6).

# Skrá fyri juli/aug

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 20. juli | kl. 20.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 21. juli | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Mikudagur | 22. juli | kl. 17-20: | Kaféterian er opin |
| | | kl. 20.00: | LAKS í Lívsins Orð |
| Leygardagur | 25. juli | kl. 21.00: | Einki AWAKE (vegna LAKS í summar) |
| Sunnudagur | 26. juli | kl. 11.00: | Morgunmøti við Sunnivu Poulsen |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 27. juli | kl. 20.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 28. juli: | | Eingin bønardagur |
| Mikudagur | 29. juli: | | Kaféterian er stongd |
| Fríggjadagur | 31. juli | kl. 20.30: | LAKS í Karis, Klaksvík |
| Leygardagur | 1. august | kl. 21.00: | Einki AWAKE (vegna LAKS í summar) |
| Sunnudagur | 2. august | kl. 11.00: | Morgunmøti við Lissi og Henning Hansen<br>Innsavnan av tíggjund og heiløgum gávum |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 3. august | kl. 20.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 4. august | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Mikudagur | 5. august | kl. 17-20: | Kaféterian er opin |
| Hósdagur | 6. august | kl. 20.00: | LAKS í Soli Deo Gloria, Klaksvík |
| Leygardagur | 8. august | kl. 21.00: | Einki AWAKE (vegna LAKS í summar) |
| Sunnudagur | 9. august | kl. 11.00: | Morgunmøti við Maibritt Frederiksberg |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 10. august | kl. 20.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 11. august | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Mikudagur | 12. august: | | Kaféterian er stongd |
| Sunnudagur | 16. august | kl. 11.00: | Morgunmøti við Búgva Olsen |

LAKS ungdómslega verður 14.-16. august (nærri kunning seinni)

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 17. august | kl. 20.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 18. august | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Mikudagur | 18. august | kl. 17-20: | Kaféterian er opin |
| Leygardagur | 22. august | kl. 21.00: | AWAKE |
| Sunnudagur | 23. august | kl. 11.00: | Morgunmøti við Paula Høj |

# Lýsingar

**Hjúnabandslegur í Kelduni**

11-13 september og 23-25 oktober verða hjúnabandslegur í Kelduni. Vit hava nú møguleika at gista í Kelduni, og tí er ætlanin at hava legurnar fríggjakvøld til sunnumorgun. Á legunum verða undirvísingar, sum hava við hjúnabandið at gera og annars hugnalig samvera við øðrum pørum. Tilmeldingin og meira nágreiniligar upplýsingar um legurnar annars verða seinni. Heilsan Hjúnarbandstænastan.

**Reingerð í fрískúlanum 8. august**

Aftur í ár fara vit at vaska frískúlan upp og niður áðrenn skúlin byrjar 17. august. Vit heita á so nógv fólk í samkomuni sum tilber at hjálpa okkum at vaska. Jú fleiri vit eru, tess skjótari gongur tað. Byrjað verður við morgunmati kl. 9.30. Vinarliga Jastrid Høj.

## Gáva til samkomuna og samkomuvirksemið

Tíggjund/gáva til Kelduna kann flytast á kontu: 9181-1205066 og 6460-1568592
Gáva til missión kann flytast á kontu: 9181-1231369 og 6460-1568606
Gáva til útbygging kann flytast á kontu: 9181-7074346 og 6460-1568584